# Allir stóðu royndina



*Hóast hann bert fyri aðru ferð slapp at byrja í týðandi dysti, so tóktist hetta ikki á nakran hátt at nerva avrikið hjá Fróða Benjaminsen. Uttan stórvegis hóvasták gjørdi hann sín 1/11 fyri at tryggja góða føroyska úrslitinum*

**Sum heild var tað talan um eitt liðavrik av teimum stóru, sum tryggjaðu Føroyum avbera góða úrslitið í Moskva. Skal nakar takast framum, má tað verða Jákup Mikkelsen, men yvirhøvur stóðu allir leikarar seg javn væl á litaða grúsvøllinum í Luzjniki Stadion í Moskva**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*

**1. Jákup Mikkelsen
Herfølge
19 dystir/0 mál**
Hevði meira enn nóg mikið at gera fyrstu løtuna, tá russar meira ella minni hersettu føroysku hálvuna. Slapp tó væl frá tí mesta, og var ósekur, tá Mostovoi skeyt einsamalla málið í dystinum. Hevði eisini í einum trimum førum nakrar kanónbjargingar, og ikki minst mundu viðleikararnir vera takksamir, tá hann bjargaði royndini móti tí púra leysa Dmitri Khoklov.

**2. Óli Johannesen
Hvidovre 50/1**
Jubilarurin á landsliðnum hevði fyrstu løtuna sera trupult við at halda skil á viðleikarunum í verjuni. Hetta batnaði tó nakað eftir fyrstu 10 minuttirnar, og so við og við gjørdist avrik hansara alt meira sannførandi. Var óheppin tá hann skeyt upp um eftir hornaspark, men hugsaði annars mest um verjupartin, ið sjálvsagt er staðið, har tørvurin á honum er størstur.

**3. Pól Thorsteinsson
B36 21/0**
Kom beina leið inn aftur á landsliðið, har hann fekk til uppgávu at taka sessin hjá Johan Byrial Hansen. Uttan stórvegis hóvasták lyfti hann uppgávna, og eftir spælinum døma, skuldi ein so avgjørt ikki hildið, at hann hevði verið hálvt annað ár burturi frá landsliðnum. Við umhugsni og kvikleika eydnaðist tað í nógvum førum at fáa eina tá ímillum russiska samanspælið, og einki er at ívast í, at Pól er komin aftur á landsliðið fyri at verða.

**4. Jákup á Borg
B36 12/0**
Slapp fyri fyrstu ferð at spæla samfullar 90 minuttir, og at hann ikki varð skiftur úr, boðar helst frá, at venjarin hevur verið nøgdur. Røkti skyldur sínar í bæði álops- og verjupartinum, og var talan um heimadyst, hevði hann ivaleyst eisini ognað føroyingum eitt brotsspark. Hevur veruliga tikið av, nú hann hevur fingið møguleikan á landsliðnum, og eigur ivaleyst nógvar dystir til góðar framyvir.

**5. Hans Fróði Hansen
B68 17/1**
Tað var fyrst og fremst í spælinum við hóvdinum, at Hans Fróði gjørdi vart við seg í hesum dystinum. Vann so at siga alt í luftini, soleiðis at russar ongan tíð gjørdist vandamiklir á hesum økinum. Hevði tó nakrar trupulleikar í spælinum niðri við jørðina, men hetta gjørdist eisini betri, tá hann slapp undan at hugsa um kvika Maxim Buznikiu.

**6. Øssur Hansen
B68 44/2**
Var við í sera nógvum av framrættaða føroyska spælinum. Ikki minst tá hann við longum sendingum skapti vandamiklar støður í fyrra hálvleiki. Við eitt sindur av hepni hevði hann eisini komið á máltalvuna, men triðja landsliðsmálið noyðist so at bíða nakað enn. Var kanska ikki heilt so stinnur í verjupartinum, sum vanligt, men hetta skyldast helst eisini sterku mótstøðumonnunum.

**7. Fróði Benjaminsen
B68 9/0**
Eftir vala avrikið í Luksemburg slapp Fróði at varveita sessin á miðvøllinum, og hetta gjørdi hann eisini uttan stórvegis hóvasták. Tordi at bjóða av, og uttan stórvegis virðing fyri mótstøðuni setti hann so avgjørt sítt merki á dystin. Saman um tikið mundi avrik hansara eisini vera tað besta á miðvøllinum, uttan at nakað tó skal takast frá monnunum, sum hann hevði við síðuna av sær.

**8. Julian Johnsson
Sogndal 38/1**
Við vandanum fyri endurtøka skal enn eina ferð sigast, at størsta styrkin hjá Julian er og verður ótrúliga orka hansara. Var við í sera nógvum á vøllinum, men í mun til dystin leygardagin, var Julian ikki so sjónligur í skapandi partinum av spælinum. Partvíst varð hetta tó orsakað av vøllinum, tí longu draginar hansara vóru at kalla ógjørligar, tá undirlagið var somikið óslætt.

**9. Kurt Mørkøre
Sogndal 34/3**
Tók av álvara dystin upp við russisku bjørnina, og ikki minst í fyrra hálvleiki gjørdi hann sær dælt av kropsstyrki síni, har hann ikki læt nakran russa sleppa at taka sær av løttum. Vann eina rúgvu av nærdystum, og var tí eisini við í so at siga øllum, sum varð skapt fram eftir í fyrra hálvleiki. Tá russar í seinna hálvleiki vórðu heldur varnari, fekk Kurt eisini minni rásarúm. At hann varð skiftur út, komst í øllum førum ikki av nøkrum vánaligum avrikið, men heldur av taktiskum orsøkum.

**10. Christian Høgni
Jacobsen
NSÍ 3/1**
Hóast góða avrikið í Luksemburg, var tað heldur óvæntað at ungi maðurin slapp at byrja inni í Moskva. Við avrikið sínum gav hann tó enn eitt frálíkt dømi um, at hann so avgjørt er ein teirra, sum nógv kann roknast av í framtíðini. Við glíðandi dragingum sínum megnaði hann fleiri ferðir at skapa órógva í russisku verjuni, og hann tóktist ikki á nakran hátt at hava trupulleikar av fysisku styrkini hjá mótstøðumonnunum. Spurningurin eftir hesar báðar dystirnar tykist kanska vera, hvat Allan Simonsen skal gera, tá allir álopsleikararnir aftur eru tøkir.

**11. John Petersen
B36 31/3**
Skuldi sum vant taka sær av kreativa partinum á miðvøllinum, og hetta megnaði hann í størri mun enn ímóti Luksemburg. Stórur partur av føroyska spælinum gekk ígjøgnum hansara føtur, og har umframt var hann á ongan hátt bangin fyri at taka eina hond við í verjupartinum. Mistók seg tó álvarsliga í einum einstøkum føri, tá hann fór skeivur av bóltinum, men hetta kann tó ikki á nakran hátt draga avrik hansara niðureftir.

**14. Sámal Joensen
GÍ 21/0**
Hóast hann nú var vorðin frískur, so var hetta ikki nóg mikið til at byrja inni aftur á vanliga plássinum á miðvøllinum. Slapp tó einasti skiftisleikari inn á vøllin, og hóast tíðin á vøllinum var ov knøpp til at geva nakra veruliga meting, so sást kortini, hví hann vanliga telist millum føstu menninar á liðnum



# Kappingin er størri



*Jákup Mikkelsen hevur einki ímóti at taka eitt hampuliga drúgt tørn á landsliðnum, um hetta kann hjálpa teimum leikarum, sum fyrr ella seinni skulu taka yvir*

**Jákup Mikkelsen roknar ikki við, at ættarliðsskiftið á landsliðnum fer at gerast nakar trupulleiki**

Landsliðið
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk – Moskva*

Seinnu árini, er tosið um valið av landsliðsleikarum hjá Allani Simonsen vorðið eitt alsamt størri kjakevni millum manna. Fleiri hava verið av teirri fatan, at hann við at halda somikið fast um ein bul av leikarum, samstundis hevur skapt ein trupulleika, tí tá hesir eru lidnir, verður mest sum eitt heilt lið at skifta út í senn.

Dystirnir í Luksemburg og Moskva hava tó sýnt, at fleiri leikarar nú standa meira ella minni klárir at taka yvir, og hetta kann so ikki sigast at vera annað enn hugaligt.

Eftir dysti tosaðu vit við landsliðsmálverjan, Jákup Mikkelsen, og hann tóktist eisini fegin um, at ungu menninir høvdu roynst somikið væl.

- Hatta er eisini nakað, sum vit hava tosað um okkara millum, tí talan kundi veruliga verið um ein trupulleika. Allan hevur jú havt eina fasta stammu so at siga alla tíðina, og felags fyri okkum allar er sjálvandi, at vit nú eru komnir nakað upp í fótbóltsárini.

- Hesa ferð vóru so fleiri av teimum, sum vanliga teljast millum berandi kreftirnar, ikki við, og tað er bara gleðiligt at síggja, hvussu teir ungu tóku møguleikan. Tað skapar størri kapping um plássini, og tað kemur so økkum øllum til góðar, heldur Jákup.

Tá tosið fellur inn á, at fleiri leikarar kanska fara at gevast á landsliðnum innan fyri eitt stutt áramál, slepst ikki undan at spyrja, hvørjar ætlanir Jákup hevur sjálvur. Sum málverji kann hann jú rokna við, at hann hevur eina longri livitíð, og hann ásannar eisini, at so er.

- Ja, eg kann kanska rokna við at verða við eitt sindur longur, og tað eri eg so avgjørt eisini hugaður í. Eg havi kanska ikki so stórt dystartal á landsliðnum, men eg haldi meg kortini hava eina hampuliga stóra rutinu, og kann eg við hesum hjálpa ungu leikarunum, so havi eg avgjørt einki ímóti tí, sigur Jákup Mikkelsen at enda.

# Pól er við aftur

**Eftir hálvt annað ár við leikbanni, kom Pól Thorsteinsson beint inn á liðið, sum í sera torførum umstøðum skuldi royna seg á Luzjniki Stadion í Moskva**

Landsdystur
*Álvur Haraldsen/Jákup ørk – Moskva*

Tað var sjálvandi ein fegin Pól Thorsteinsson, sum eftir dystin kundi staðfesta, at hann fyri fyrstu ferð í hálvt annað ár hevði spælt við í týðandi landsdysti. Eftir dystin móti Luksemburg var leikbann hansara runnið út, men spurningurin tóktist so vera, hvørt tað fór at vera rúmd fyri honum á liðnum.

- Jú, tað hevði eg sjálvandi vónað, men hinvegin kundi eg jú ikki rokna við tí eftir avrikið ´Luksemburg.

- Vónirnar bygdi eg á, at Allan alla tíðina hevur víst mær álit, soleiðis at eg alla tíðina havi kent, at tørvur er á mær. Har afturat havi eg ongan tíð sitið á beinkinum, har eg havi verið, og tí hevði eg kanska nakað ilt við at ímynda meg sjálvan í hesum leiklutinum.

- Boðini um hetta fekk eg so ikki fyrr enn á taktik fundinum, so sjálvandi var eg fegin. Hóast tað merkti at ein spælari (Johan Byrial Hansen, blðm.), sum hevði leikt fram úr í fyrra dystinum varð vrakaður.



*Tað var ein smílandi Pól Thorsteinsson, sum eftir dystin kundi staðfesta, at hann nú aftur er komin í landsliðshitan*

### Fluttu seg nógv

Nú var talan sum sagt um fyrsta veruliga landsdystin í hálvt annað ár, men sjálvur helt Pól ikki, at tað var nakar trupulleiki at fella inn í liðið.

- Eg kom inn á stopparaplássið, har eg byrjaði á landsliðnum, og hóast mær dámar betri á bakkinum, so spæli eg sjálvandi har, um eg fái boð um tað. Burtur sæð frá fyrstu løtuni, so haldi eg eisini at vit høvdu gott tak á teirra áleyparum.

- Trupulleikin fyrstu løtuna var, at vit ikki høvdu nakran ávísan mann at mansverja, men at Hans Fróði og eg bara skuldu taka teir sum teir komu. Teir vóru bara somikið skjótir, og fluttu seg somikið væl, at hetta als ikki riggaði hjá okkum. Vit gjørdu so av at hava hvør sín, og tá fingu vit so beinan vegin skil á.

Eins og flestu viðleikararnir, so mátti Pól hóast alt ásanna, at talan var um eitt gott úrslit, sum landsliðið fekk í Moskva.

- Eg má siga, at 0-1 í Moskva so avgjørt ikki er vánaligt. Sjálvandi er tíðin farin, har vit bara vóru við fyri at læra, men hinvegin skulu vit heldur ikki fara at rokna við, at vit skulu fara úr Moskva við einum ella trimum stigum, sigur Pól Thorsteinsson at enda.



# Kvikkir russar

**Óli Johannesen helt eftir dystin, at skjóta russiska spælið tók føroyingar á bóli fyrstu løtuna**

*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk, Moskva*

Fyrstu 10 minuttirnar av dystinum tóktist tað meira ella minni sum um Føroyar vóru aftur í gomlu Landskronadøgnum. Við níggju monnum afturi í egnum brotsteigi royndu teir av øllum at verja málið. Seinni gjørdist tó nakað betri, og okkara fingu flutt spælið longur niðan á vøllin.

### Spældu skjótt

Eftir dystin hittu vit føroyska liðskiparan, Óla Johannesen, sum eisini skuldi stýra føroysku verjuni. Vit spurdu hann, hví tað gekk so striltið at skipa føroyska spælið fyrstu løtuna.

- Tað var bara tað, at teir spældu so ótrúliga skjótt. Vit kláraðu snøgt sagt ikki at fylgja við, tá teir við fullari ferð spældu uppeftir. Jógvan Martin (Olsen, blðm.) segði eisini við okkum í hálvleikinum, at tað tók honum 15 minuttir at finna út av teirra uppstilling. Bara tí teir fluttu seg so nógv.

Eftir fyrstu tíggju minuttirnar tóktist tað tó, sum um føroysku leikararnir fingu betri skil á spælið. Tá russar sóu, at okkara eisini kundu skapa nakað, gjørdust teir meira varnir, men liðskiparin helt tó, at tað alla tíðina var sera trupult.

- Sjálvandi gjørdist tað betri, tá vit fingu flutt okkum longur niðan. Lætt varð tað tó ongantíð, tí teir spældu alla tíðina rættiliga skjótt. Kanska dugdu teir eisini betri við vøllinum enn vit.

### Ernir hóast alt

Fram móti endanum av dystinum fór ein hending fram, har Óli og Alexandur Mostovoi at kalla brustu saman. Av áskoðaraplássunum sást ikki so sjónliga, hvat tað var sum hendi, men Óli hevði so sína avgjørdu meining um hetta.

- Hann tók meg í eitt stað, har mann ikki skal taka, og aftan á slóð hann meg í búkin. Eg gjørdi ikki nógv annað enn at skumpa hann eitt sindur, men dómarin kom beinan vegin til, og so var tað liðugt. Tað var sum so ikki nakað serligt.

Um sjálvan dystin helt Óli, at føroysku leikararnir høvdu alla orsøk til at vera ernir um úrslitið.

- Eg má siga, at eg haldi tað vera fantastiska flott av øllum liðnum, at vit tapa 1-0 móti Russlandi á útivølli, og samstundis vera keddir um tapið, tá vit fara av vøllinum.